OYRARNAR á TOFTUM
- EIN MENNINGARÆTLAN

19.05.2020

FUGLARK



OYRARNAR á TOFTUM
- ein menningarætlan

UPPSKOTSENDAMÁL og FORTREYTIR

Stevnumiðið við uppskotnum er at at vísa á ítøkiligar trivnaðarligar menningar-møguleikar fyri økið í Oyrunum á Toftum.
Trivnaður er vítt hugtak. Fram við sjóvarmálanum á Toftum – bæði uttan- og innanfyri Oyrarnar eins væl og í Oyrunum sjálvum, er nógv virksemi. Oyrarnar eru óloysiligar tengdar at bygdar- og kommunuheildini, og eru í tí serstøðu, at tær, stórt sæð, hava verið fríhildnar fyri tí annars rættiliga ídnaðarkendu byggingini á havnarlagnum. Við smábátahavn og fjøru eru tær ein trivnaðarskái, har bygdarlagið og bygdarfólkið fær samband við sjóvarmálan.
Málið við uppskotinum er at sýna hættir at nýta hetta gylta høvi til við skynsamari og miðvísari økisskipan at menna staðið sum trivnaðarstað – hetta, bæði skipanar-, tøkni- og byggilistarligar

GRUNDARLAG

Uppskotið tekur støði í 'Verkskrá – Menning av økinum við bátahylin á Toftum' dagfest 2020-03-16 og hartil hoyrandi skjølum.
Uppskotið tekur støði lýsingini í verkskránni av endamáli, bakgrund – yvirskipaðum ynskjum, tørvi, góðsku, fíggjarligum kørmum, tíðarkarmi, ætlanarstøðu, stigvísari útbygging og brúkarabólkum v.m.

ØKIÐ í søgu og nútíð

Oyrarnar vóru náttúruhavn. Skergarður var uttanfyri og sum heild rættiliga fjøruslætt innanfyri - ein góð støð.
Ikki er tað av tilvild at smábátahavnin er júst har hon er, og at verjugarðurin liggur inn eftir skerunum. Hetta hongur alt, hóast helst farið í gloymskuna hjá teimum flestu, neyvt saman við tí lendisliga upprunaskapinum – yvir og undir sjóvarmálanum.

Oyrahandilin varð óiva upprunaliga staðsettur út móti sjóvarmálanum, tí alneyðugt var við beinleiðis sjósambandi – at fáa vøru og fisk, saltaðan inn og turkaðan út, so ómakaleyst sum møguligt.

Heitið 'Oyrahavnin' er rætt og vakurt.

KRINGUMSTØÐURNAR og ØKISSKIPANIN

Oyrarnar eru sera ásýnligar allastaðni frá á Toftum og eru miðsettar í mun til bygdarlagið bæði lendisliga og ferðsluliga og í mun til havnarlagið annars. Hetta, eins væl og sjóvegis.

Oyrahavnin – havnin sjálv, verður skipað við innsigling har norðuri í Norðurhavnini út fyri Rættarstøðna við Gestahavnini uttanfyri. Innanvert innsiglingina til Miðhavnina stendur Sjóbúðin. Norður-, Mið- og Syðstahavnin eru umgirdar av gongu- og atløgubryggjum.

Nýtsluliga verða Oyrarnar lendis- og nýtsluliga meiri at rokna sum ein fólksligur partur at bygdarlagnum enn havnarøkini annars, og verður tí lagt upp til, at Oyrarnar í størri mun enn nú hava sína egnu vegatkomu. Ikki so, at vegsambandið haðani og til ta ytra og innara havnaøkið verður kvett, men við at tað innara havnarøkið fær sína egnu landsvegaíbinding við gerð av møguligari rundkoyring har Høganesvegurin kemur oman – hetta, fyri samstundis at betra um ferðslutrygdina har.

Lendisliga verður lagt upp til innbjóðandi, opið og nátúrligt lendissamband millum bygdarlagið og Oyrahavnina, og at staðseta bygging á Skergarðslandið uttanvert havnina – heldur lægri kinkaða bygging inn ímóti havini og heldur vavmiklari og frástøðuligari bygging ytri á.

Við suðurendan á Syðstuhavn er Oyratún við Oyrapallinum sum lívdarskjóli móti lágættunum.

NÝTSLA

Havnin er smábátahavn til bæði frítíðarbátar eins væl og smáar útróðrarbátar. Í Norðastuhavnini úti fyri Rættarstøðni er høvi til at skipa atløgupláss til gestabátar.

Við Rættarstøðna er støð til sjóítrótt s.s. 'surfing', kajakrógving o.tíl. Norðanfyri støðna er sandur, við støðna er 'Gunnhildskai' og drátturin á Rætt og uttanfyri støðna er óspilt fjøra – og verður hon at varðveita.

Byggingin á Skergarðslandinum er skipað við bústøðum á ovaru hæddunum og blandaðari nýtslu í kaihæddini.

Økið sum heild er skipað og sniðgivið miðandi ímóti veru og trivnaði við Oyratúni sum snúnigsási.

SNIÐ og TILFAR

Tilfarið í.s.v. lendi – áleggingar og bygningslutir, vera við timburløgdum gongubryggjum, grótbrimgørðum, gróðrarøkjum og asfalteraðum vegum og grasarmeraðum parkeringsøkjum.

Bygningar vera klæddir við timbri – ávikavist nátúrliga littum og málaðum hitaviðgjørdum lerkaviði, vindeygu málaði aluminiumsprofil og aðrar flatur við sama tilfarsbrái.

STIGVÍS BYGGING

Ei heldur Róm varð bygdur eftir einum degi, og verður her víst á ein leist fyri stig-, men miðvísa, bygging í og menning av í økinum í samráð við brúkarabólkar og viðkomandi arkitektfakliga ráðgeving.

Byggingar- og menningarleisturin er ætlaður sum grundarlag fyri yvirskipaðum byggiásetingum fyri økið – við tíðaratlitinum og skiftandi byggirákum í huga, vera slíkar ásetingar at snúgva seg meiri um nýtslu, vav o.tíl. enn um snið, litir o.tíl.

VERANDI VIÐURSKIFTIR



ÚTFYLLING



GONGUBRYGGJA



BYGNINGAR og SNIÐGØTUR



FERÐSLA



BYGGISTIG

FUGLARK

- OYRALANDIÐ -

Oyrapallur

Oyratún

Suðurhavnin

Miðhavnin

Rættarstøðin

Fjøra

Sjóitróttarstøð

Sandur

Norðurhavnin

Innsigling

Gestahavn

- SKERGARÐSLANDIÐ -

N

VERANDI

ÚTFYLLING

GONGUBRYGGJA

BYGNINGAR

FERÐSLA

BYGGISTIG

A

B

C

D





Electric Fields